**(Uppskot til)**
**Kunngerð um at fyribyrgja dálking frá oljutangum**

Við heimild í § 7, nr. 1 og 4, § 40, § 43, § 69 og § 72, stk. 3 og stk. 4 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, verður ásett:

*Gildisøki*

**§ 1.** Kunngerðin er galdandi fyri oljutangar í sethúsum og øðrum bygningum, sum rúma upp til 6.000 litrar og íbundin rør.

*Allýsingar*

**§ 2.** Í hesi kunngerð er:

1) *Áfyllingarstað*: staðið, har olja verður fylt á tangan,
2) *Blenda:* at tippa fyri áfyllingina, soleiðis at olja ikki kann fyllast á tangan,
3) *Einstreingjað rørskipan:* skipan, har olja einans verður førd úr oljutanga til oljufýr,
4) *Góðkendur tangi:* tangi, sum antin er
   1) sniðgóðkendur til nýtslu í norðurlondum ella
   2) CE-merktur.
5) *Veitari:* tann, sum selur og fyllir olju á tangan.
6) *Ovfyllingarávaring:* skipan, sum ávarar ímóti ovfylling av tanga.

*Krøv til eigara*

**§ 3.** Eigari av oljutanga skal tryggja, at:

1) verandi tangi lýkur krøvini í § 6,
2) tangin verður uppsettur ella niðurgrivin sambært krøvunum í § 7,
3) tangaváttan og spjaldur eru tøk smb. § 5,
4) upplýsingar um tangan eru sendir kommununi, smb. §§ 9-10,
5) tangin verður avriggarður sambært § 8
6) tangin verður útskiftur sambært § 11 og § 12, og
7) tangin ikki elvir til dálking, smb. § 13.

*Krøv til veitarar*

**§ 4.** Veitarin hevur ábyrgd av, at áfyllingin fer rætt fram og ikki elvir til dálking.

*Stk. 2.* Veitarin skal ansa eftir, at veitingarútbúnaðurin ikki hevur brek, og at tað ikki verður fylt meira á, enn tangin kann rúma.

*Stk. 3.* Veitari skal sýta fyri at fylla á tangar, har eyðsýndur vandi er fyri oljudálking og alt fyri eitt boða eigara frá hesum.

*Krøv til innflytarar og seljarar*

**§ 5.** Tað er einans loyvt at innflyta og selja góðkendar oljutangar, sum hava tangaváttan, og eru merktir við hesum upplýsingum:

1) navn og bústað hjá framleiðara,
2) tangasnið og -rúmd,
3) framleiðslunummar og -ár,
4) góðkenningar- ella sniðgóðkenningarnummar ella
5) CE-merking, tá tangin hevur slíka.

*Stk. 2.* Tá oljutangi verður seldur ella latin víðari, skal tangaváttan og spjaldur fylgja við, og fráboðan sendast kommununi við upplýsingum um bústað og matr. nr. og avrit av tangaváttanini.

*Oljutangar*

**§ 6.** Allir tangar skulu vera góðkendir. Tangar, sum ikki eru góðkendir, skulu takast úr nýtslu, smb. § 11 og § 12.

*Stk. 2.* Tangar, sum hava fingið skaða, skulu umvælast ella takast úr nýtslu.

*Stk. 3.* Allir tangar skulu hava ovurfyllingar-ávaring og verða íbundnir oljufýringina við einstreingjaðari rørskipan.

**§ 7.** Oljutangar skulu setast upp ella gravast niður sambært vegleiðing frá framleiðara og sambært vegleiðing frá Umhvørvisstovuni.

*Stk. 2.* Tangar skulu ikki tyrvast, fyrr enn kommunan hevur tryggjað sær, at krøvini í hesi kunngerð eru fylgd.

*Stk. 3.* Verður oljutangi fluttur, skulu tangi og rørleiðingar tømast frammanundan.

**§ 8.** Oljutangi, sum verður tikin úr nýtslu, skal avriggast forsvarliga:

1) tangi og rørleiðingar skulu tømast,
2) møguligt spjaldur skal takast av,

3) tangin skal takast niður ella gravast upp og latast góðkendum móttakara av burturkasti, sbr. tó stk. 2.

*Stk. 2.* Kommunan kann, eftir umsókn frá eigara veita undantak frá stk. 1, 3. pkt., um tað verður mett umhvørvisliga forsvarligt og rímiligt, tó treytað av, at tangin verður fyltur við sandi og áfyllingarstaðið blendað.

*Stk. 3.* Tangi, sum fyribils verður tikin úr nýtslu, skal blendast.

*Stk. 4.* Eigari skal boða veitaranum og kommununi frá, tá tangi verður tikin úr nýtslu fyribils ella endaliga.

*Skráseting av tangum*

**§ 9.** Kommunan skal skráseta allar oljutangar.

*Stk. 2.* Eigari, ella seljarin eigarans vegna, skal lata kommununi avrit av tangaváttanini.

**§ 10.** Eigari av tanga, sum er settur upp ella grivin niður, áðrenn henda kunngerð kom í gildi, skal áðrenn 1. juli 2018 senda kommununi avrit av tangaváttan ella senda inn hesar upplýsingar í tann mun, tær eru tøkar:

1) navn og bústað hjá framleiðara,
2) tangasnið og -rúmd,
3) framleiðslunummar og -ár,
4) sniðgóðkenningarnummar,
5) um tangin hevur yvirrenningarávaring, og
6) um rørskipanin er einstreingjað.

*Stk. 2.* Kommunan kann krevja aðrar upplýsingar, enn tær, sum eru nevndar í stk. 1, um hetta verður mett neyðugt fyri at fyribyrgja dálking ella verja umhvørvið.

*Tíðarfreistir fyri útskifting*

**§ 11.** Stáltangar, sum standa yvir jørð, skulu takast úr nýtslu innan hesar freistir:

1) Góðkendir tangar, við tæringarverju innan, skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 40 ár eftir framleiðsluárið,
2) Aðrir stáltangar skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 30 ár eftir framleiðsluárið.

*Stk. 2.* Aðrir góðkendir tangar, sum standa yvir jørð, skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 20 ár eftir framleiðsluárið.

*Stk. 3.* Er framleiðsluárið ókent, skal tangin í seinasta lagi takast úr nýtslu 1. januar 2022.

**§ 12.** Niðurgrivnir tangar skulu takast úr nýtslu innan hesar freistir:

1) Góðkendir stáltangar, sum eru tæringarvardir innan og uttan, skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 50 ár eftir framleiðsluárið.
2) Góðkendir stáltangar, sum ikki eru tæringarvardir innan, skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 40 ár eftir framleiðsluárið.
3) Stáltangar, sum eru vardir uttan við glas-fipurstyrktum polyester, men ikki eru góðkendir, og aðrir tangar, har framleiðsluárið er ókent, skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 1. januar 2022.

*Oljudálking*

**§ 13.** Tann, sum varnast leka frá oljutanga ella rørleiðing, skal alt fyri eitt boða eigara og kommununi frá.

*Stk. 2.* Áfylling skal steðgast alt fyri eitt, um oljudálking ella vandi fyri oljudálking er staðfest.

*Stk. 3.* Um olja lekur úr tanga ella rørleiðing, skal eigarin beinanvegin seta í verk átøk at fyribyrgja dálking, t.d. at tøma oljuna úr tanganum.

*Stk. 4.* Kommunan kann geva eigara boð um at seta ávís tiltøk í verk innan ávísa freist, ella alt fyri eitt, at fyribyrgja og avmarka dálking. Ger eigarin ikki eftir boðunum, kann kommunan seta átøkini í verk fyri eigarans rokning.

*Eftirlit og kæra*

**§ 14.** Kommunan hevur eftirlit við, at reglurnar í hesi kunngerð verða hildnar.

*Stk. 2.* Kommunan kann geva boð um, at ein tangi skal kannast, tømast, flytast, umvælast, takast úr nýtslu, gravast upp ella burturbeinast, um vandi er fyri dálking ella dálking er staðfest.

**§ 15** Avgerðir tiknar av kommununi sambært hesi kunngerð kunnu, innan 4 vikur, kærast til Umhvørvisstovuna.

*Stk. 2.* Avgerðir tiknar av Umhvørvisstovuni sambært hesi kunngerð, kunnu ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

*Revsing og gildiskoma*

**§ 16.** Við bót veður revsaður tann, sum

ikki heldur §§ 4-8, ikki letur upplýsingar inn sambært § 9, stk. 2 og § 10, stk. 1 og 2, ikki skiftir tangan út sambært freistunum í §§ 11-12 og ikki heldur § 13, stk. 1-3.

*Stk. 2.* Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

**§ 17**. Hendan kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Sirið Stenberg
landsstýrismaður

Turid Arge, aðalstjóri